ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.

fisk@fisk.fo
Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
Postboks 347
110 Tórshavn

Tórshavn 19.03.2018
J. nr. 20180140
Skrivari: Petra Viderø Johannesen
pvj@jura.fo

**Kæra av avgerð hjá Vørn um hækking av partapeningi í P/f Kósini**

Við hesum skal eg kæra eina avgerð frá Vørn, um hækking av partapeningi í P/f Kósini. Avgerðin er viðløgd.

Í hesi avgerð kemur Vørn til ta niðurstøðu, at partaeigararnir í P/f Kósini ikki kunnu hækka partapeningin, orsakað av reglunum í lóg um sjófeingi, um at útlendingar skulu úr fiskivinnuni seinast 1. januar 2024.

**Ætlanin hjá Kósini**
Ætlanin hjá Kósini er at gera íløgur fyri uml. 40 mio kr. Játtan er fingin til meginpartin av hesi íløgu treytað av, at partapeningurin verður hækkaður við uml.10 mio kr. Tí er ætlanin, at verandi partaeigarar skulu hækka partapeningin lutfalsliga. Býtið í sambandi við hækkanina er gjørt á tann hátt, at útlendski ognarparturin ikki veksur í sambandi við hækkingina, men minkar í veruleikanum 0,5 %.

**Avgerðin hjá Vørn**
Vørn tulkar skiftisreglurnar í lóg um sjófeingi soleiðis, at ein slík partabrævahækking er at javnmeta við sølu, og eftir nýggju lógini um sjófeingi er ásett, at um partabrøv verða seld í skiftistíðini, skulu partabrøvini sambært § 9, stk. 3, einans seljast til føroyingar.

Vørn staðfestir somuleiðis at nýggja lógin einki nevnir um kapitalhækkingar í skiftistíðini.

Eftir okkara meting, er ein grundleggjandi munur á eini lutfalsligari kapitalhækking og eini sølu. Um ein søla av partapeningi fer fram, hendir ein broyting í teimum viðurskiftum, sum hava við avgerðarrætt og útluting av vinningi í einum felag, nevniliga soleiðis, at keyparin alt annað líka fær størri avgerðarrætt í felagnum, umframt at keyparin eisini eftir keypið fer at hava størri lut í úrsliti og útlutingum frá felagnum.

Tá ið talan er um eina lutvísa kapitalhækking, har verandi partaeigarar framvegis eiga partapening felagsins í sama lutfalli, fer eingin broyting fram í avgerðarrættinum í einum felag, og heldur eingin

broyting fer fram í útlutingum av úrsliti í felagnum. Avgerðarrætturin og útlutingin fer framvegis fram í sama lutfalli sum partarnir eiga í felagnum áðrenn kapitalhækkingina, við tað at hetta lutfallið er óbroytt eftir hækkingina.

Í avgerð síni vísir Vørn á, at sølur skulu fara fram til persónar heimahoyrandi í Føroyum, og víðari verður víst til serligu viðmerkingarnar har ásett er:

"Á hendan hátt verður eingin nýggjur útlendskur eigarapartur í føroyskum fiskiførum frá tí degi, lógin kemur í gildi ... "

Í sambandi við avgerð í hesum máli, hevur tað týdning, hvussu orðið "eigarapartur" verður tulkað, og júst nevnda brot, sum Vørn vísir til í avgerð síni, vísir eftir mínum tykki, at orðið "eigarapartur" snýr seg um lutfalsligan part av felagnum, við tað at nevnda brot bert vísir til sølur av partapeningi.

Ein orðatulking av hugtakinum "eigarapartur" stuðlar eisini hesi tulking, tí nevniliga "eigara**partur**" eigur at verða tulkað soleiðis, at talan er um, hvussu stóran "part" viðkomandi eigur í felagnum, tvs. lutfalsligan prosentpart av felagnum.

Um støðið verður tikið í teimum tilvísingum til viðmerkingar til lógina, sum Vørn nevnir í avgerð síni, er eisini greitt, at einki er, sum forðar fyri eini lutvísari kapitalhækking í mun til endamálið við at avmarkað útlendskan eigarapart. Endamálið er nevniliga:

- At tryggja, at avkastið kemur samfelagnum til góðar
- At forða fyri, at stýringin og ræðið á rættindum verða flutt av landinum

Ein kapitalhækking er á ongan hátt í stríð við nakað av hesum atlitum, tí útlendski eigaraparturin og avgerðarrætturin, verður ikki hækkaður við eini lutvísari kapitalhækking, og avkastið kemur í sama lutfalli føroyska samfelagnum og føroysku partaeigarunum tilgóðar, og stýringin og ræðið av rættindunum, verður á ongan hátt flutt av landinum við eini slíkari lutvísari kapitalhækking.

Eg eri tí ikki samdur í, at "útlendski eigarin ognar sær nýggjar eigarapartar við kapitalhækkingini". Tað, sum hendir er, at partapeningur felagsins veksur við kapitalhækkingini, men við tað, at hon er lutfalslig fara útlendsku eigararnir at eiga sama eigarapart í felagnum aftaná sum áðrenn kapitalhækkingina.

Sum nevnt nevna skiftisreglurnar bara møguligar sølur í skiftistíðini. Viðmerkingarnar til lógina nevna greitt, hvørji endamál eru við hesum broytingum, og **einki** av teimum endamálum, sum eru nevnd, eru í stríð við ætlanina hjá Kósini at hækka partapeningin.

Tí eigur fyrisitingin ikki at fremja eina so avgerandi víðkaða tulking av lógini í stríð við ætlanirnar hjá felagnum. Serliga, tá ið ein avhending av partapeningi og ein kapitalhækking í felagsrættinum eru tvey grundleggjandi ymisk fyribrigdi.

Nakað annað var, um talan var um at víðka tulkingina av hugtakinum sølu í dømum har ætlanin hjá einum felag var at fremja eina ikki-lutfalsliga kapitalhækking, har útlendski partaeigarin einsamallur hækkaði partapeningin. Tá hevði støðan verið tann, at "eigaraparturin" hjá hesum útlendingi hækkaði,

og tá hevði verið skiljandi, at myndugleikarnir noktaðu, somuleiðis um talan t.d. var um annað slag um avhending enn sølu, t.d. um útlendingur hevur veð í partapeningi og realiseraði hesa trygd, men í okkara føri, fer eingin broyting fram í býtinum av eigarapørtum í felagnum.

Málið hevur skund, tí nevndu umbyggingar av Kósini eru byrjaðar, og felagið hevur átikið sær ymiskar skyldur í hesum sambandi.

Niðurstøðan hjá Fiskimálaráðnum, fer uttan iva eisini at hava týdning fyri onnur virkir á landi, sum eiga partapening í felagnum, sum hava fiskiloyvir, tí fleiri virkir standa fyri at fremja umbyggingar.

Við tað, at málið er so avgerandi fyri okkum, kundu vit hugsað okkum at komið á ein fund við Fiskimálaráðið at tosa nærri um hetta, áðrenn tit taka avgerð.

Við heilsan

Niels Winther Poulsen, adv.
nwp@jura.fo

VØRN

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

P/F Kósin
Kósabrúgvin 3
Postrúm 56
700 Klaksvík

*Tórshavn, tann 16. mars 2018*
*Mál: 18/00138-3*
*(at tilskila í svari)*

*Viðgjørt: JHE*

*Tygara skriv:*

YVIRI VIÐ STROND 3
P.O.BOX 1238
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

PHONE +298 311065
FAX +298 313981
VORN@VORN.FO
WWW.VORN.FO

Viðvíkjandi hækkan av partapeninginum í P/F Kósin

Vísandi til fyrispurning frá Niels Winther Poulsen, sakførara, um at hækka partapeningin í P/F Kósin.

Lóg um fyrisiting av sjófeingi, ið kom í gildi 1. januar 2018, herðir krøvini til útlendskan eigaraskap í feløgum, ið reka virksemi innan fiskivinnu. Tað eru einans persónar og feløg, ið eru heimahoyrandi í Føroyum og lúka treytirnar í §§ 6,7 og 9, ið kunnu reka virksemi innan fiskivinnu. Tey feløg, ið eru í vinnuni, við gildiskomu løgtingslógarinnar, kunnu tó halda fram til 1. januar 2024, hóast § 7, stk. 2, nr. 4 og 5, treytað av, at tey luku treytirnar í lóg um vinnuligan fiskiskap. Feløgini kunnu, sambært almennu viðmerkingunum til lógina, virka fult út sum onnur feløg - tað merkir at tey kunnu bjóða uppá rættindir á uppboðsølu, bjóða seg fram at fiska av kvotum hjá øðrum og so framvegis.

Um eigari, ið ikki er heimahoyrandi í Føroyum, skal selja síni partabrøv í skiftistíðini so ásetir lógin greitt í § 9, stk. 3, at tað einans eru persónar ella feløg heimahoyrandi í Føroyum, ið kunnu keypa hesi partabrøv. Lógin nevnir einki um kapitalhækkingar ella um tað skal verða loyvt eigarum, ið ikki eru heimahoyrandi í Føroyum at hækka teirra kapital í felagnum.

Í almennu viðmerkingunum til lógina stendur, at endamálið við at avmarka útlendskan eigarapart og avgerðarrætt er at tryggja, at avkastið kemur samfelagnum til góðar, og forða fyri, at stýringin og ræði á rættindunum verður flutt av landinum. Sostatt er tað av týdningi, at eingin partabrævasøla fer fram soleiðis, at eigarar, ið ikki eru heimahoyrandi í Føroyum, fáa meiri ræði á ella avgerðarrætt í feløgum, ið reka virksemi innan fiskivinnu.

Í serligu viðmerkingunum verður skriva, at um útlendskur partaeigari selur síni partabrøv, so skal keyparin av partabrøvunum lúka treytirnar í lógini um at vera heimahoyrandi í Føroyum. Víðari stendur: "*Á henda hátt verður eingin nýggjur útlendskur eigarapartur í føroyskum fiskiførum frá tí degi, lógin kemur í gildi...*" Sostatt er endamálið við ikki at loyva sølu av partabrøvum til persónar ella feløg, ið ikki eru heimahoyrandi í Føroyum, at eingir nýggir útlendskir eigarapartar skulu verða í feløgum, ið reka virksemi innan fiskivinnu, eftir 1. januar 2018.

P/F Kósin hevur ætlanir um at fremja eina lutvísa kapitalhækking, soleiðis, at útlendski partaeigarin hækkar sín kapital, men kemur framhaldandi at eiga sama

lutfalsliga part í felagnum sum frammanundan. Tískil verður eingin broyting í ræðinum og avgerðarrætinum hjá útlendska eigaranum í felagnum. Tó so kemur útlendski eigarin at ogna sær nýggjar eigarapartar, við kapitalhækkingini.

Vørn metir, at endamálið við § 9, stk. 3 í lóg um fyrisiting av sjófeingi, er, at eingin nýggjur útlendskur eigarapartur skal verða í feløgum, ið reka virksemi innan fiskivinnu eftir 1. januar 2018. Tað er sostatt ikki einans, at ræði og avgerðarræturin hjá útlendskum partaeigarum økist, ið er av týdningi, men eisini at tryggja, at eingin nýggjur útlendskur eigarapartur kemur inn í føroysku fiskivinnuna.

Tí er avgerð tikin um ikki at góðkenna ætlaðu kapitalhækkingina í P/F Kósin.

Hendan avgerð kann kærast til Fiskimálaráðið í seinasta lagi 4 vikur frá dagfesting av hesum brævi.

Vinarliga heilsan

**Jóhan Hendrik Ellefsen**

FAROE ISLANDS VØRN FISHERIES INSPECTION